# Rituvíksgenta lokkar fe

Guðrið Højgaard er komin longur enn hon nakrantíð kundi droyma um. 33 ára gomul er hon blivin marknaðarstjóri fyri allari privatu ferðavinnuni í Stockholm. - Eg havi fingið mítt absolutta dreymaarbeiði, nú eru allir pusslubitarnir fallnir upp á pláss, sigur hon





**FAKTA**

Navn: Guðrið Højgaard
Aldur: 33 ár
Býr: Stockholm
Ættað úr: Rituvík
Familja: Maðurin Bjørn + foreldur og sjey systkin í Føroyum og Danmark
Arbeiði: Marknaðarstjóri fyri tí privatu ferðavinnuni í Stockholm

**FØROYINGUR UTTANLANDS**

*Inna Törnroos*

Guðrið tekur ímóti mær í tí nýggju loftíbúðini mitt í Stockholm. Hon og maðurin Bjørn hava stórar byggiætlanir fyri íbúðina, men í løtuni tekur arbeiðið tað mesta av tíðini hjá Guðrið.

Klokkan er 19.30 og Guðrið er akkurát komin frá arbeiði, hon hevur havt fund við eitt reklamuvirki. Hon letur seg skjótt úr tí formellu skjúrtuni og blakar seg í sofuna í t-shirt og flesakjóla.

Guðrið er uppvaksin í Rituvík og er nummar sjey av átta systkjum. Hon fór fyrstu ferð úr Føroyum longu sum 16 ára gomul. Tá bar leiðin til Spania sum AFS-ari.

– Tað árið var tað týdningarmiklasta í mínum lívi, eg lærdi meg spanskt og víðkaði mín sjónarring.

Eitt ár seinni kom hon aftur og byrjaði á HF í Eysturoynni. Aftan á tvey ár og eitt flott prógv bar leiðin fyrst til Onglands sum au pair og seinni til Handilsháskúlan í Keypmannahavn. Guðrið byrjaði at lesa internationella marknaðarføring saman við enskum og sponskum.

Maðurin Bjørn, sum er svenskari, arbeiddi tá fyri stóru fyritøkuna Ericsson í Keypmannahavn. Síðsta árið á tí fimm ára longu útbúgvingini vildi Guðrið gjarna taka uttanlands, og bar tí leiðin til Stockholm 1998.

Tað var í Stockholm, Guðrið byrjaði at arbeiða við ferðavinnu. Hon fekk eitt lestrararbeiði á Danska Turistráðnum í Stockholm og bleiv so væl dámd, at eftir lokna útbúgving bleiv hon boðin fast arbeiði við ábyrgd fyri tí strategisku marknaðarføringini av Danmark í Svøríki.

– Eg var heppin at fáa mítt fyrsta arbeiði so lætt, tað er annars ofta ringt at fáa fyrsta starvið, tá tú ikki hevur nakrar royndir, sigur Guðrið.

Hon arbeiddi í fimm ár á Danmarks Turistråd og fekk støðugt meira ábyrgd. Hetta var um tað mundið, tá Oyrasundsbrúgvin bleiv upplatin, og tí var áhugin fyri Danmark í Svøríki sera stórur.

Tað var eisini á tí arbeiðsplássinum, har Guðrið møtti sínum sokallaða mentor, Martin Rosborg. Han var tá leiðari á Danmarks Turistråd, og Guðrið bleiv skjótt hansara høgra hond.

Tá hann fekk tilboð um at taka við róðrinum á Stockholm Visitors Board, sum er organisatiónin fyri alla ferðavinnu í Stockholm, var hann ikki seinur at lokka nøkur av sínum bestu starvsfólkum við til nýggja arbeiðið. Og har var sjálvandi Guðrið Højgaard ein.

– Eg innsá, at tað var ein »once in a lifetime« møguleiki